# Bókabussar rulla enn

Hóast tað eru liðin fimtan ár, síðan bókabussurin gavst at koyra í Føroyum, verður tað framvegis nógvastaðni í grannalondum okkara hildið at vera eitt frálíkt hugskot at bjóða teimum borgarum, sum búgva fjarskotnir frá nærmasta bókasavni, bókasavnstænastu á henda hátt.

Á bókastevnuni Bok & bibliotek vórðu í ár vístir fram nakrir av nýggjastu bókabussunum í Svøríki. Tað kann skjótt staðfestast, at í 2007 verða onnur krøv sett til bókabussar enn fyrst í nítiárunum, tá ið vit seinast høvdu bókabuss í Føroyum.

Nýggju bókabussarnir hava ikki bara bøkur, men eisini teldur, sum eru knýttar í alnetið, sjónvarp, og nógvar aðrar miðlar enn bøkur til at lána út, so sum ljóðbøkur, tónleik og filmar. Samanumtikið ger hetta, at betri pláss verður hjá lánarunum, tí hesir miðlar fylla ikki eins nógv og bøkurnar.



# Metstór bókamessa í Göteborg

**Omanfyri 100.000 fólk vitjaðu teir 880 framsýnararnar á størstu norðurlendsku bókamessuni, Bok og bibliotek, í Göteborg í síðstu viku**

## Bøkur



**Arnbjørn Ó. Dalsgarð**
arndal@flb.fo

Ársins útgáva av stóru árligu bóka- og bókasavnsmessuni Bok & bibliotek í Göteborg slerdi øll met í mun til undanfarin ár í tali av vitjandi og framsýnarum. Heili 108.468 fólk vitjaðu messuna dagarnar 27-30. september, og tað eru fleiri enn í 2004, sum annars var metár. Talið av framsýnarum var í ár var 881, og tað eru 31 fleiri enn í 2006, sum átti hetta met. Sostatt er Bok & bibliotek nógv tann størsta bókamessan í Norðurlondum.

Á hvørjum ári er eitt høvuðstema á stevnuni. Í ár var tað Estland, við denti á estiskar rithøvundar og estiskar bókmentir, og hetta merkti sjálvandi útboðið av tiltøkum, fyrilestrum og framsýnarum á messuni. Men eisini vóru hópin av øðrum tiltøkum um eina ørgrynnu av evnum, og her á opnuni verður trivið í sumt av tí, sum messan bjóðaði teim vitjandi.

Høvuðsnavnið hesaferð var suðurafrikanski erkibiskupurin Desmond Tutu, sum fekk friðarheiðursløn Nobels í 1984. Hetta setur sjálvandi sín dám á tað úrvalið her, eins og tað eisini setti sín dám á sjálva messuna. Seinni verður her í Sosialinum farið meiri í dýpdina við onkrum av tí, sum fór fram á Bok & bibliotek 2007.




Bok & Bibliotek '07

# Saknur í føroyskum bási

**Tað hevði økt um áhugan fyri føroyskum bókmentum uttanlands, um Føroyar høvdu ein bás á Bok & bibliotek. Íslendingar gera á hvørjum ári nógv burturúr sínum bási, og tað hevur ivaleyst gjørt sítt til, at íslendskir rithøvundar eru so sjónligir í Svøríki í dag.**



Tað heldur Kirsti Hansen, sum vit hittu á Bok & bibliotek bókamessuni í Göteborg leygardagin. Kirsti er doktari í norðurlendskum máli og hevur undirvíst á lærda háskúlanum í Göteborg síðan 1994. Hon minnist væl, tá ið føroyingar høvdu sín egna bás á Bok & bibliotek, tí hon plagdi sjálv at standa har nakrar tímar hvønn dag.

- Fyrstu árini hevði Norðurlandahúsið ein føroyskan bás, og seinni tók Samfundet Sverige-Färöarna yvir básin. Men seinnu árini hava Føroyar als ikki verið umboðaðar á størstu bókamessuni í Norðurlondum, og tað er spell, sigur Kirsti Hansen.

Hon vísir á, at svenski marknaðurin er tann størsti í Norðurlondum, og ein føroyskur básur, har føroyskir rithøvundar eisini vitjaðu, kundi fingið forløg og lesarar í Svøríki at varnast, at tað finnast føroyskar bókmentir, sum verdar eru at lesa.

- Tað hevði eisini givið føroyskum rithøvundum góðar møguleikar at komið í samband við svenskar útgevarar og rithøvundar, sigur Kirsti Hansen.

Sosialurin